## Stella og Petur farin til Kenya

Fyri góðum trimum vikum síðani fóru hjúnini Stella og Petur Zachariasen saman við yngstu dóttrini Kezia til Kenya. Tey skulu har virka saman við felagsskapinum "New Life Africa International" (NLAI). Hesin felagskapur er stovnaður av donsku hjúnunum Susanne & Leif Madsen, sum nakrar ferðir hava verið í Føroyum og kunna um teirra virksemi. Hjúnini Malena og Jens Meitilberg úr Havn hava áður virkað saman við NLAI. Sunnudagin 23. august luttóku tey bæði við eitt møti í Evangeliihúsinum, har greiddu frá arbeiðinum, og har tey vórðu vælsignað av samkomuni.



## Frá skúla til bygdarhús

Eitt av málunum á seinasta bygdaráðsfundi í Sunda kommunu var málið um, hvat gerast skal við gamla skúlan á Langasandi. Undan fundinum hevði fíggjarnevndin samtykt at finna ein leist fyri, hvussu bygdarfelagið kann yvirtaka bygningin. Og á fundinum í bygdaráðnum varð hetta málið einmælt samtykt.

# Ætlan um ungdómshús í Eysturkommunu

**Gongst sum ætlað, fær ungdómurin í Gøtu og Leirvík sítt egna ungdómshús í framtíðini**

UNGDÓMUR
*Snorri Brend*

**Gøtugjógv:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við hesi ætlanini, eins og ein arbeiðsbólkur hevur latið eitt tilmæli til kommununa.

Her hevur ein arbeitt við málinum, og mælti trivnaðarnevndin til at umsitingin skuldi kanna møguleikan fyri annaðhvørt at keypa ella leiga bygningin hjá Føroya Banka í Gøtugjógv og somuleiðis kannar hølisviðurskiftini.

- At trivnaðarnevndin júst vísir áhuga fyri hesum bygningi er einføld: Hølini liggja nevniliga í einum góðum og vælegnaðum umhvørvi til eitt ungdómshús, verður sagt úr Eysturkommunu.

Trivnaðarnevndin skjýtur somuleiðis upp, at tilmælið frá arbeiðsbólkinum verður lagt fyri býráðið. Síðani er ætlanin, at býráðið skal taka eina prinsippiella avgerð um, hvussu arbeiðast skal víðari við málinum í komandi ári.

Fíggjarnevndin í Eysturkommunu sigur í sínum tilmæli, at trivnaðarnevndin kannar aðrar møguleikar, millum annað at fáa samstarv við grannakommununar.

Tá málið var til viðgerð á býráðsfundi í farni samtykti tað einmælt at beina málið í trivnaðarnevndina til víðari viðgerð.



*Gamli bygningurin hjá Føroya Banka verður møguliga eitt ungdómshús í framtíðini*

## Gera bungur í vegin

**Streymnes:** Í eini roynd at gera ferðina eftir Streymnesvegnum tryggari, hevur bygdaráðið í Sunda kommunu í eina tíð arbeitt við eini ætlan um, hvussu ein best kundi gera hetta.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini fyri sløkum mánaði síðani, var eitt mál um at gera vegbungur til viðgerðar. Og hetta málið varð samtykt.

Tá málið um at gera hesa royndina við tí nýggja slagnum av ferðsluforðingum, ið m.a. eru kendar úr Havn, varð til viðgerð, varð samtykt at leggja tað fyri bygdaráðið til endaliga støðutakan.

Á seinasta fundinum í bygdaráðnum varð einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá byggi- og býarskipanarnevndini.

Ætlanin er, at taka upphæddina til hesar vegbungurnar av kontoini til viðlíkahald av vegunum í kommununi.

## Færri sandoyingar

Seinastu hagtølini frá vísa, at fólkatalið í Sandoynni og Suðuroynni minkar, meðan tað veksur í øðrum økjum.

Síðani 1985 eru teir fastbúgvandi sandoyingarnir fækkaðir við 334 og eru í dag 1438 í tali.

Fólk, sum Sandoyarportalurin hevur tosað við siga, at einasti útvegur fyri at steðga aftургongdini er at farið verður undir ætlaða Sandoyartunnilin.

# Kendur kórleiðari á sangskeið



*Ragnhild Hiis Ånestad skal leiða felagskórið á sangskeiðnum hjá Heimamissiónini*

**Tað er ein kent gospelnavn í Noregi - Ragnhild Hiis Ånestad - sum kemur til Føroya at leiða sangskeiðið hjá Heimamissiónini í næsta mánaði**

SANGSKEIÐ
*Snorri Brend*

**Nesvík:** Dagarnar 9. til 13. oktober verður nevniliga árliga sangskeiðið hildið í Leguhúsinum í Nesvík.

Tá kemur Ragnhild Hiis Ånestad, sum stendur á odda fyri tí besta barnagospelkórinum í Noregi, Oslo Soul Children, at leiða stóra felagskórið.

Ragnhild hevur longu gjørt vart við seg í Noreg, har hon hevur framført fyri bæði Haraldi kongi og Sonju drotning og norska forsætisráðharranum, Jens Stoltenberg.

Nú stendur so ein føroysk avbjóðing fyri framman, tá luttakararnir eru fáum døgum skulu læra nýggjar sangir og framføra teir á eini konsert.

### Kend nøvn

Tað er ikki nakar óroyndur kórleiðari, ið vitjar á okkara leiðum í heystfrítíðini.

Umframt navnframar framførslur, hevur Ragnhild harafturat samstarvað við bæði Kirk Franklin og Josh Groban úr USA í sambandi við ymiskar framførslur.

Sjálv er Ragnhild sera spent uppá Froyavitjanina og hevur fyrireikað seg til at geva sangskeiðsluttakarum eina uppliving fyri lívið.

Limirnir í sangnevndini hjá Heimamissiónini kunnu tí í dag staðfesta, at kórleiðarin er funnin, tónleikararnir eru funnir og at skeiðstaðið er Nesvík.

Sangskeiðið endar við konsert í Norðurlandahúsinum týskvøldið 13. oktober.